Best umtóktu reality røðirnar í 2010: 1. Fangerne på fortet, 2. Paradise Hotel, 3. Tingvarpið.
**Maður 46 ár**

LAGT TIL RÆTTIS: Eydna Skaale

# Miðlamjørr



*"Antin hevur tú tað stuttligt, ella hevur tú tað ikki stuttligt. Um ikki, eigur tú ikki at fara til hendan filmin ella seta hann frá. Skemt er skemt, og tað behøvist ikki at analyserast til deyðis. Er man við, so er man við*

Jákup Veyhe um filmin Klovn

Eg havi akkurát deilt verðina upp í tveir bólkar: Tey sum síggja UPP til tey sum duga, og tey sum síggja NIÐUR á tey sum duga. Hesi eita meirilutin. Og so tey sum duga sjálvandi (minnilutin)
**Maður 45 ár**



*"Hann snýr seg um nakað, sum viðkemur sera nógvum fólkum. Hann er rørandi*

Susanne Bier um hví Hævnen hevur vunnið ein Golden Globe



*"Føroyar eru heimsins mest globaliseraða land!*

Jørgen Niclassen

Ok tit, eg havi bílagt mær eina skoytuprinsessudrakt við øllum tinglitangli til, so nú er bara líka eftir at venja hattar har við at lyfta beinið upp um høvd.......tað verður ikki eitt eyga turt :)
**Kvinna 39 ár**



*"Tit kunnu bara seta mær betri spurningar!*

Wozniacki um atfinningarnar, hon í seinastuni hevur fingið frá altjóða pressuni, um at hon er keðilig at interviewa.

*Hóskvøldið meðan flestu konur í landinum eru í bindiklubba og menn sita einsamallir heima, borðreiður Sjónvarp Føroya við toppleysari servering og stripptis.*

John William Joensen



*"Í Føroyum hava vit eitt sjúkrahúsverk. Eitt sjúkrahúsverk, sum virkar á trimum matriklum.*

Aksel V. Johannesen

Hví slítur Javnaðarflokkurin ikki??
**Maður 42 ár**






*"Vit hava í nøkur ár hoyrt um neyðars roykjararnar, sum ikki longur sleppa at roykja nakrastaðni. Í síðstu viku hoyrdu vit, at 20.000 børn verða innløgd árliga, sum ein beinleiðis fylgja av, at foreldini roykja. Tástandi frættu vit um tey veruligu offrini*

Annette Heick